# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
tlf 341800

*– Tað nyttar einki at verða beskeðin. FCK skal royna at koma víðari frá bólkaspælinum í Champions League*

*Morten Olsen, danskur landsliðsvenjari í fótbólti*

# Síðsti møguleikin hjá NSÍ

**Við sigri á heimavølli kann oddaliðið EB/Streymur, sum saknar liðformannin, rættuliga seta tingini upp á pláss**




*NSÍ hevur vunnið tvær ferðir á EB/Streymi í ár. Nú hittast liðini fyri triðju ferð, og hesaferð er dysturin á Mølini á Eiði*

EB/STREYMUR-NSÍ
*Jákup Mørk*

Oddaliðið í Formula deildini, EB/Streymur, hevur vunnið á øllum feløgunum í ár. Tó er tað eitt undantak. EB/Streymur hevur tvær ferðir vitjað í Runavík, og báðu ferðirnar hevur NSÍ fingið fulla úrtøku.

Sunnudagin fær EB/Streymur enn ein møguleika at fáa bilbukt við NSÍ. Oyggjauppgerðin verður á Mølini, har heimaliðið ikki hevur tapt higartil í ár. Tíggju ferðir hevur EB/Streymur átt heimavøll. Átta ferðir hava teir fingið fulla úrtøku, og tvær ferðir hevur úrslitið verið 1-1 – móti KÍ og HB.

Um tað eydnast samansetta liðnum í Sundalagnum at fáa fulla úrtøku, so fer tað at síggja avbera gott út í kappingini um FM.

Tað er dyggur smeitur, at liðformaðurin og stýrimaðurin í verjuni, Egil á Bø, ikki verður førur fyri at spæla, tí hann mikukvøldið móti ÍF koykti fótin illa. Tað kemur væl við, at hin fasti miðverjin, Marni Djurhuus, nú tykist vera komin fyri seg eftir skaðasteðg. Harafturat telur tað rætta vegin, at Ronnie Samuelsen og Knút Vesturtún, sum vóru leiðbannaðir, tá ið EB/Streymur mikukvøldið vann 2-0 á ÍF, nú eru tøkir aftur.

### Jens Martin tøkur aftur

Hjá NSÍ hevur tað hilnast illa tvær tær seinastu ferðirnar, tá ið mótstøðuliðini hava verið úr høvuðsstaðnum. Sunnudagin tapti NSÍ 3-1 á heimavølli móti HB, og mikukvøldið tapti NSÍ 2-1 í Gundadali móti B36.

Úrslitini seinastu ferðirnar bera við sær, at vánirnar at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð eru nógv versnaðar. Heiðursmerkini eru kortini ikki so ógvuliga langt burtur.

– Seinastu tvey tapini hava verið dýr, og nú hava vit veruliga knívin á barkanum. Vinna vit ikki á Eiði, so eru vit púrasta úti. So har verður tað bara sigurin, sum telur, sigur Sonni L. Petersen.

Karstin Joensen hevur verið fínur avloysari millum stólparnar tvær tær seinastu ferðirnar. Sunnudagin verður tað tó ivaleyst Jens Martin Knudsen, sum fer at verja málið. Eftir leikbann er veteranurin aftur tøkur.

Mikukvøldið sótu eisini Brynjolvur Nielsen og Jústinus R. Hansen leikbannaðir uttanfyri. Nú eru teir tøkir aftur. Tí er ivasamt, um unglingarnir Filip Egholm Jacobsen og Jann Martin Mortensen, sum vóru á beinkinum mikukvøldið, hesa ferð fara at fáa boð.

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 20 | 12 | - | 5 | - | 3 | 48 | 22 | 26 | 41 |
| 2 HB | 20 | 10 | - | 6 | - | 4 | 44 | 32 | 12 | 36 |
| 3 B36 | 20 | 10 | - | 6 | - | 4 | 33 | 23 | 10 | 36 |
| 4 NSÍ | 20 | 10 | - | 5 | - | 5 | 41 | 26 | 15 | 35 |
| 5 KÍ | 20 | 8 | - | 8 | - | 4 | 42 | 26 | 16 | 32 |
| 6 GÍ | 20 | 7 | - | 10 | - | 3 | 25 | 20 | 5 | 31 |
| 7 Skála | 20 | 6 | - | 5 | - | 9 | 26 | 22 | 4 | 23 |
| 8 VB/S | 20 | 4 | - | 4 | - | 12 | 18 | 54 | -36 | 16 |
| 9 B68 | 20 | 2 | - | 5 | - | 13 | 21 | 45 | -24 | 11 |
| 10 ÍF | 20 | 2 | - | 4 | - | 14 | 19 | 47 | -28 | 10 |

# Skansin hjá KÍ er á útivølli

**Toftamenn hava allar sínar menn tøkar, nú teir skulu royna at lyfta seg eitt sindur úr botninum, sum teir leingi hava hingið fastir í**

B68-KÍ
*Jákup Mørk*

Tað telur skjótt niður hjá B68. Hóttanin av niðurflytingini er stór. B68 er fimm stig frá triði aftasta plássinum. Við gongdini hjá VB/Sumba seinastu ferðirnar í huga kann roknast við, at toftamenn skulu vinna nógv stig í sjey teimum seinastu umførunum, um teir skulu hava møguleika at lætta sær á.

Mánakvøldið var B68 á sigurskós í Gøtu, men í síðsta minutti mistu teir tvey stig. Allir B68 spælararnir eru tøkir upp undir KÍ vitjanina. Eitt ivamál er tó. Tað er Kári Hansen, sum var skaddur, tá ið B68 spældi 1-1 í Gøtu.

### Heðin við aftur

Hjá klaksvíkingum, sum skulu reisa seg eftir dyggan lúsing á heimavølli móti VB/Sumba, er Harley Bertholdsen leikbannaður eftir útvísingina sunnudagin.

Oddmar á Lakjuni verður heldur ikki við hesa ferð, tí hann er framvegis skaddur. Heðin á Lakjuni sat uttanfyri seinast, tí hann ikki hevði verið førur fyri at venja.

Í hesi vikuni hevur Heðin vant, og tí verður hann ivaleyst á KÍ liðnum.

### KÍ fær stigini á útivølli

Fyrr í summar vann B68 púra óvæntað 3-1 í Klaksvík, eftir at KÍ uppaftur fyrr í summar hevði vunnið 4-0 á Svangaskarði.

Merkisvert er tað, at KÍ, sum oftast hevur verið roknað at standa seg framúr væl á heimavølli, í ár hevur staðið seg væl betri á útivølli enn á heimavølli. Klaksvíkingar hava hvørja ferð havt stig við sær aftur til hús, tá ið teir hava spælt aðra staðni.

KÍ hevur vunnið seks útidystir, og fýra ferðir hevur tað verið javnt.




*KÍ fær hvørjaferð stig við sær heimaftur eftir útidystir. Sunnudagin spæla teir ímóti B68 á Toftum*

## U19 hjá kvinnum tikið út

Álvur Hansen, landsliðsvenjari, hevur tikið spælararnar út, sum skulu við U19 kvinnulandsliðnum til EM-undankapping í Svøríki síðst í september. Spælararnir eru: Simona Heinesen, Rannvá Poulsen, Olga Kristina Hansen, Hellen Haraldsen AB, Unnur Danielsen, Rúna Højgaard B36, Rakul Magnussen, Frida Gregersen, Rudi Zachariassen EB/Streymur, Hanna Isaksen, Jacoba Langgaard GÍ, Bjørg B. Syderbø HB, Sigrid Petersen, Heidi Sevdal NSÍ, Unn Petursdóttir Kruse, Rutt Thomassen, Kristina S. Joensen SÍ, Monika Samuelsen VB/S.

## Fremad Amager avlýsti

Dysturin hjá Fremad Amager í donsku steypakappingini í mikukvøldið varð avlýstur. Ætlanin var, at Fremad Amager skuldi spæla á útivølli ímóti Østerbro IF, men vøllurin varð mettur at verða í so ringum standi, at dysturin var avlýstur. Nú verður roknað við, at dysturin verður spældur fyrst í næsta mánaði, og tá verður Andrew av Fløtum, sum hevur drigist við skaða seinastu vikurnar, helst førur fyri at spæla aftur.

## FCK fekk United

Í gjár var lutakast um, hvussu FC Keypmannahavn skal spæla í Champions League kappingini. FCK kom í bólk saman við Manchester United, Benfice og Celtic. Fyrsti dysturin hjá FCK verður tann 13. september, tá ið Benfica vitjar í Parkini. 1. november spælir Manchester United í Parkini, og seinasti dysturin hjá FCK verður ímóti Celtic tann 6. desember. Harafturat spælir FCk eisini útiodystir ímóti hesum feløgum. FCK hevur í nógv ár roynt at komið við í bólkaspælið í Champions League, men hetta er fyrstu ferð, at tað eydnast størsta felagnum í Danmark at koma so langt.